# Røktarheim má bíða

Í 2002 samtykti býráðið í Fuglafirði at byggja nýtt røktarheim, og tey trý næstu árini vórðu pengar játtaðir á fíggjarætlanini til endamálið. Men fyrr í ár fekk kommunan at vita frá almanna- og heilsumálaráðnum, at hon fær ikki stuðul til at byggja heimið í hesum umfari. Tí hevur Fuglafjarðar kommuna ikki sett pengar av til røktarheim á fíggjarætlanini fyri 2007. Annars hevur kommunan 8 mió. krónur á bók til endamálið.

# Nógv sild

Tað hevur gingið væl hjá íslendska verksmiðjuskipinum Engey, síðani tað fór úr føroyskum í íslendskan sjógv at royna fyri hálvum øðrum mánað síðani. Seinasta vikuskifti vóru teir inni á Reykjavík og landaðu. Teir høvdu millum 1.600 og 1.700 tons av frystum sildafløkum, sum fara á russiska marknaðin. Engey er farin útaftur, men tá skipið kemur innaftur, skal verksmiðjan hava nakrar ábøtur, áðrenn skipið fer nýggjan túr.



smæðst burtur millum hinar bygdirnar í Føroyum. Bæði innan vinnulív, ítrótt og annað finst í Gøtu kommunu nógv tilfar, sum hevði verið áhugavert at fingið samlað í bók, áðrenn ov nógv hvørvur í gloymskunnar hav, heldur Gøtu kommuna.



*Av størri verkætlanum á fíggjarætlanini fyri 2007 er nýggjur útstykkingarvegur fram við handils-og vinnuøkinum í Gøtudali, har Landsverk ætlar at gera rundkoyring komandi ár*

# Hálvt annað stig heitari í november

**- Miðalhitin í november hevur seinastu 30 árini verið 4,9 stig, men í november í ár var miðalhitin heili 6,4 stig, sum er hálvt annað stig meira, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur**

**Hitalag**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í greinastubba á hesum síðunum verður víst á, at veðurlagsgranskarar spáa heitari veðurlag á jørðini komandi tríggjar mánaðirnar.

Veðurfrøðingurin hjá Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen, hevur í morgun hugt at miðalhitanum í Føroyum í november í ár í mun til miðalhitan í november annars.

Úrslitið er, at tað hevur verið munandi heitari í ár enn vanligt.

Petur Skeel Jacobsen sigur, at miðalhitin í november seinastu 30 árini hevur verið 4,9 stig, men í ár lá hitin um heili 6,4 stig, sum er hálva annað stig heitari enn vanligt.

- Hetta er rættiliga nógv, tá ið havt verður í huga, at hitamátingar eru gjørdar í so mong ár, sigur hann.

Tað er granskingarstovnurin IRI (The International Research Institute for Climate and Society), sum hevur ávarað um heitari veðurlag á jørðini komandi mánaðirnar.

Samstundis, sum hitin hevur verið hálvt annað stig hægri í Føroyum í november í ár enn ein miðal november mánaða, hevur vætan eisini verið út við helmingin meira.



*Hans Pauli Højgaard helt jólatalu í Æðuvík sunnukvøldið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Jólabygdin er tendrað

**Sunnukvøldið tendraðu mongu og vøkru ljósini, sum Æðuvíkin er vorðin so kend fyri í jólamánaðinum. Tað var Hans Pauli Højgaard úr Rituvík, sum helt taluna í ár, og Nes sóknar Hornorkestur setti enn einaferð sín serstaka dám á eina slíka løtu**

**ÆÐUVÍK**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Æðuvíkin kann av røttum kalla seg jólabygdin fram um allar – ella hin føroyski Las Vegas, sum onkur hevur tikið til.

Aftur í ár er bygdin pyntað til jólar. Øll húski í bygdini taka lut í hesum, og nú mongu og vøkru ljósini tendraðu í sunnukvøldið, sást, at bygdin er vorðin uppaftur vakrari enn áður.

Løtan í Æðuvík, tá ið ljósini verða tendrað, savnar nógv fólk til bygdar, og í so máta var sunnukvøldið einki undantak.

Nógv fólk var til løtuna, sum fall á turt veður. Annars liggur landnyrðingurin tráur upp á land í Æðuvík, men løtan eydnaðist sera væl, tí veðrið helt sær – og tað fór ikki at regna fyrr enn eftir sjálvt haldið.

Tað var nevniliga soleiðis, at lítla løtu eftir, at Hans Pauli Højgaard úr Rituvík hevði hildið jólataluna, fór at regna.

Nes sóknar Hornorkestur setti enn einaferð sín serstaka dám á eina slíka løtu, og meðan fólk vóru savnaði í Æðuvík, fingu tey, sum hildu seg fram at, gløgg og holukakur.

Jólamenn vóru eisini í Æðuvík sunnukvøldið.

Bygdarfólkið í Æðuvík hevur í ár sett upp ein kaffiskúr miðskeiðis í bygdini, har fólk kunnu keypa sær kaffi.

Sum skilst á æðuvíkingum, verður skúrurin opin um kvøldarnar fram til jóla.

Hópur av fólki plaga at koyra sær ein túr til Æðuvíkar at síggja jólabygdina í desember, og nú kunnu tey so eisini keypa sær kaffi á vitjanini.

Æðuvíkin er rættiliga vorðin eitt ferðamál hjá familjum við børnum í jólamánaðinum.

Jólabygdin er heilt avgjørt verd eina vitjan.



*Jólamenn vóru eisini á vitjan í Æðuvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*